# Gera klárt til meiri virksemi á Tvøroyri

**Nú skulu umstøðurnar á Drelnesi gerast betri fyri at skapa fortreytir fyri meiri virksemi á økinum**

HAVNAÚTBYGGING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein partur av ábótunum á Drelnesi er at fylla hylin í gomlu havnini út. Borgarstjórin sigur, at russarar eru áhugaðir at brúka Drelnes til umskipingarhavn*

Nú ætlar Tvøroyrar kommuna at fáa størri nyttu burturúr havnarlagnum á Drelnesi.

Í tí sambandi hevur Tvøroyrar Býráð samtykt at gera ymsar ábøtur á økinum.

Tilsamans verður mett, at hesar ábøtur fara at kosta fast í tveimum milliónum.

Á býráðsfundi fyrr í vikuni samtykti býráðið at fylla hylin á gomlu bryggjuni á Drelnesi út og at stoypa dekk í, so at tað fæst eitt rættiliga stórt øki burturúr.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at arbeiðið er mett at kosta umleið 1,5 millión.

Men býráðið hevur eisini fyri stuttum samtykt at gera nakað við nýggjara partin av havnalagnum á Drelnesi. Tað er havnin, sum Smyril brúkar nú, og kemur at brúka, til nýggja samferðsluhavnin er liðug.

Í tí sambandi hevur Býráðið samtykt at sprongja eina grynnu burtur, sum er beint uttanfyri atløgubryggjuna.

Hendan grynnan fær skyldina fyri, at tað er so ókyrt á Drelnesi, at tað ikki er liggjandi hjá skipum.

Hetta arbeiðið er mett at kosta 300.000 krónur og tá er alt grótið eisini tikið upp av botni. Talan er um einar 1000 rúmmetrar av gróti, sum skulu sproingjast og takast upp.

Býráðslimir førdu fram, at vísti hetta seg ikki at hjálpa upp á ókyrruna, var arbeiðið als ikki burturspilt kortini, tí hetta fór undir øllum umstøðum at gera havnina betri.

Verður grynnan sprongd burtur, kunnu skipini leggja beint at. Sum er, noyðast tey at sigla útum grynnuna og síðani bakka at bryggju og tað er óheppið hjá stórum skipum.

Býráðið hevur somuleiðis samtykt at gera aðrar ábøtur á gomlu bryggjuna á Drelnesi, har tað er máað so nógv undan tveimum kistum, at vandi er fyri, at tær koppa, kemur tung ferðsla oman á keiina.

Tað arbeiðið fevnir um at stuðla uppundir kisturnar við 20-25 rúmmetrum av betongi og tað arbeiðið er mett at kosta nakað yvir 100.000 krónur.

### Fáa tvey fyri eitt

Kristin Michelsen sigur, at tá ið hetta arbeiðið er gjørt, verða munandi betri umstøður á Drelnesi.

Borgarstjórin sigur, at tá ið hetta arbeiðið er gjørt, er havnin á Drelnesi í fínasta standi.

– Tá verður havnin á Drelnesi í fínasta standi og tá fer at bera til at bjóða stórum skipum framat, sigur hann.

Og tað er kanska ikki so langt burtur, at fleiri skip fara at brúka Drelnes, tí borgarstjórin sigur, at russisk feløg eru áhuga at fáa skip á Drelnes at umskipa á sama hátt sum tey nú brúka Havnarvág.

Tað verður byggifelagið Articon, sum skal gera arbeiðið. Hetta er sama felag, sum ger nýggju samferðsluhavnina og tað er sostatt longu á fjørðinum við allari útgerð.

– Av tí, at Articon longu er á fjørðinum frammanundan við øllum amboðum og allari útgerð, sum krevst, kann arbeiðið gerast nógv bíligari enn annars, sigur borgarstjórin.

Ætlanin er sostatt eisini at fara undir arbeiðið beint aftaná at teir sleppa frá ferjuleguni.

# Sambýli letur upp á Tvøroyri í summar



*Hesi húsini á Tvøroyri hevur Tvøroyrar Kommuna samtykt at keypa til sambýli og tað letur upp longu í summar*

**Tvøroyrar Kommuna hevur keypt eini hús á Tvøroyri, sum skulu brúkast til sambýli**

ELDRAPOLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í summar letur nýtt sambýli upp á Tvøroyri.

Á býráðsfundi á Tvøroyri fyrr í vikuni, samtykti býráðið at keypa eini sethús á Tvøroyri og at brúka tey til sambýli.

Talan er um eini hús, sum standa niðanfyri vegin, úti ímóti grótbrotinum, við frálíkum útsýni yvir fjørðin.

Talan er um eina útreiðslu upp á eina góða millión og ætlanin er, at sambýlið skal lata upp í summar.

Men umframt keypsprísin, kemur kommunan at bera útreiðslurnar til náttarvaktir.

Kristin Michelsen, borgarstjóri, sigur, at ætlanin er ikki at gera nakað við húsini.

– Tað eru fleiri kømur í húsunum og har er pláss fyri seks fólkum, sigur hann.

Tilsamans er innrættaði parturin í húsunum 350 fermetrar í tveimum hæddum og tey eru klár at flyta inn í.

### Hava somu støðu

Higartil hevur Tvøroyrar Býráð verið ímóti, at kommunurnar sjálvar.

– Eldrapolitikkur er heilt greitt eitt landsmál. Og tað, sum kommunurnar gera, vit at byggja sambýli, er í veruleikanum at sleppa landinum undan síni ábyrgd, sigur borgarstjórin. Hann sigur, at tað er eisini ymiskt, hvussu landið viðgerð tær ymsu kommunurnar. Sambýlini í onkrum kommunum, hevur landið bygt og einsamalt og rekur tey einsamøll, men aðrastaðni noyðast kommunurnar sjálvar at byggja og at rinda ein part av rakstrinum.

Sostatt hevur Tvøroyrar Kommuna havt ta púra greiðu støðu, at hon fer ikki at útvega sambýli, sum er.

Og hóast kommunan nú hevur keypt sambýli, merkir tað ikki, at støðan er broytt.

– Vit hava framvegis okkara greiðu støðu. Einasta orsøk til at vit hava útvegað hetta sambýli, er, at talan er um eini hús, sum altíð kunnu seljast aftur.

Men Kristin Michelsen sigur, at hendan støðan hjás kommununi merkir ikki, at tey eldru á Tvøroyri, eru slept upp á fjall.

– Kommunan arbeiðir við at fyrireika sambýli. Og so skjótt eitt greitt ábyrgdarbýti er gjørt ímillum land og kommunu, eru vit til reiðar at gera okkara skyldu á økinum. Men í løtuni er tað als ikki uppgávan hjá kommununum, sigur borgarstjórin.

Eitt annað sambýli hevur verið á Tvøroyri, men vóru ein privathús, sum vórðu skipað sum sambýli sum ein bráðfeingisloysn. Hetta sambýli heldur uppat nú.

Har hava verið fýrafimm fólk, men seinastu tíðina hevur bara eigarin verið eftir og hann er nú farin á ellisheimið.

# Varðveita gomlu træbrúnna

TRÆBRÚGV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Træbrúgvin á Hvítanesi er ein av teimum heilt fáu, sum eru eftir í Føroyum og tað heldur Tvøroyrar Býráð vera vert at varðveita*

Tvøroyrar Býráð hevur samtykt, at gamla træbrúgvin á Hvítanesi skal varðveitast.

Hetta er ein av teimum fáu, veruligu træbrúgvunum, sum eru eftir í landinum og tað heldur býráðið, at tað er vert at varðveita.

Hon hevur verið í so ringum standi, at fyri nøkrum árum síðani varð bummur settur fyri, tí tað var vandamikið at fara út á hana.

Men nú skulu nýggir uppstandarar setast upp fyri at gera brúnna trygga aftur.

Hetta er eitt arbeiðið, sum er mett at kosta 150.000-200.000 krónur og tað skal gerast í summar.



# Veittra yvirskotunum farvæl

**Landsroknskapurin fyri 2003 gav slakar 20 mió. krónur í yvirskoti. Roknskapurin fyri 2003 verður helst tann seinasti landskassaroknskapurin í fleiri, sum fer at geva yvirskot á botnlinjuni**

LANDSROKNSKAPUR 2003
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*– Vit seta okkara vón til, at fiskaprísirnar aftur fara at kvinka uppeftir, og at alivinnan kemur fyri seg aftur. Fiskaprísurin hevur alt siga, um vit skulu fóta okkum aftur, vísir landsstýrismaðurin á, sigur Bárður Nielsen*
*Mynd: Savnsmynd*

– Hetta er ein serligur bóklingur. Fyri tað fyrsta er kápuliturin lillaður, og fyri tað næsta hevur hann eitt yvirskot. Sum útlitini eru í løtuni, fer tað at taka nøkur ár, áðrenn vit aftur kunnu gleðast um eitt yvirskot á landsroknskapinum.

Nakað soleiðis legði ein embætismaður á Fíggjarmálaráðnum fyri á tíðindafundi mánamorgunin, tá hann í stuttum greiddi frá landsroknskapinum fyri 2003.

Úrslitið fyri fíggjarárið 2003 hjá landskassanum gav slakar 20 mio. krónur í yvirskoti.

– Búskapurin hevur fingið eina ótrúliga vend síðan 2001.

Landskassaroknskapurin í 2001 gav eitt yvirskot á 700 mió. krónur, og bert tvey ár seinni hava vit eitt yvirskot á 20 mió. krónur. Komandi ár hevur samgongan eina fíggjarætlan, sum gevur eitt hall á 200 mió. krónur. Sostatt er nærum um 1. mia. krónur á muni frá 2001, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Landsstýrismaðurin legði afturat, at føroyski búskapurin kom seg ómetaliga skjótt eftir kreppuna fyrst í nítiárunum, og hann vónaði, at sama gongd fór at gera seg galdandi hesaferð, hóast fleiri vinnur eru fyri hóttafalli.

– Vit seta okkara vón til, at fiskaprísirnar aftur fara at kvinka uppeftir, og at alivinnan kemur fyri seg aftur. Fiskaprísurin hevur alt siga, um vit skulu fóta okkum aftur, vísir landsstýrismaðurin á, sigur Bárður Nielsen

### Inntøkurnar svíkja

Undir framløguni av landskassaroknskapinum fyri 2003 varð greitt frá, at tað er serliga inntøkusíðan hjá landskassanum, sum svíkir. Meðan stígur er komin í inntøkuvøksturin, halda útreiðslurnar á við at økja hjá landskassanum

Á tíðindafundinum kom fram, at serliga niðurskurðurin í ríkisveitingini úr Danmark og minkandi skattainntøkur er orsøkin til fallið á inntøkursíðuni hjá landskassinum. Tað er serliga lønarútreiðslurnar, sum eru øktar nógv seinastu árini. Síðan 1997 eru útreiðslurnar hjá landskassanum til lønir øktar heili 50%.

– Tað er altíð lætt at vera bakklókur, men vit áttu at havt tálmað lønarvøkstrinum nakað. Ein øking á 50% er rættiliga nógv í mínum oyrum. Eg veit kortini fullvæl, at tað er rættiliga torført at halda aftur í so góðum tíðum, vit hava havt seinastu árini, sigur Bárður Nielsen landsstýrismaður.

1. oktober í ár fáa fleiri lønarbólkar aftur eina lønarhækking á góð 4,5 %, sum fakfeløgini samráddu seg til á seinastu lønarsamráðingum við landsstýrið.

### Skeiv avgerð

Í 2002 valdi undanmaðurin hjá Bárði Nielsen í Fíggjarmálaráðnum, Karsten Hansen, at gjalda góðar 500 mió. krónur eyka av uttanlandsskuldini hjá landskassanum.

– Tað er sjálvsagt í ordan at gjalda skuld aftur. Kortini skuldi Karsten Hansen sæð hvønn veg tað bar búskaparliga, og út frá tí haldi eg ikki tað var rætt av honum at gjalda hatta eykaláni, sigur Bárður Nielsen frá.




*Á myndini sæst hvussu nógv føroyskur búskapurin er broyttur síðan 1997. Í 2004 verða fyri fyrstu hægri útreiðslur enn inntøkur*

# Public Service i Føroyum

Um vikuskiftið varð skipað fyri skeiði í public service fyri føroysku fjølmiðlarnar. Tað var Nordvision, sum skipaði fyri. Millum onnur fólk, sum vóru til staðar, var generaldirektørurin í Danmarks Radio, Christian S. Nissen.

Ymisk evni viðvíkjandi public service vórðu tikið upp, millum annað ein ávís tvístøða hesum viðvíkjandi: Samfelagið og staturin gjalda fyri føroyskt útvarp, so hvussu sleppa vit undan einum statsradio? Men hinvegin, hvussu tryggja vit óheftni, soleiðis at útvarpið ikki verður ein »statur í einum stati?«

Ferðalagið við generaldirektørinum í Danmarks Radio fór aftur til Danmarkar sunnumorgunin.

**hkm**